LØGTINGIÐ

Til
Luttakarar til Ungdómstingið 2010

Umsitingin

**11. januar 2010**
**j. nr. 10-20090001[2]**
(at tilskila í svari)

**Ungdómsting 2010**

Hervið skal verða sagt frá, at uppskotini hjá tykkum koma til viðgerðar í Ungdómstinginum 8. og 9. februar.

Tit skulu velja 9 næmingar í tykkara flokki, sum skulu umboða tykkum á Ungdómstinginum. Best er, um næmingatalið verður býtt javnt millum gentur og dreingir. Nøvnini og teldupostadressur hjá hesum 9 umframt lærarunum skulu sendast Løgtinginum í seinasta lagi fríggjadagin tann 15. januar á logting@logting.fo.

5 framhaldsflokkar hava sent inn uppskot, og tey koma øll til viðgerðar á Ungdómstinginum. Uppskotini verða í næstum løgd út á heimasíðuna hjá Løgtinginum.

Á 1. fundinum í Ungdómstinginum 8. februar skal ein uppskotssetari leggja uppskotið fram, og tað kunnu tit eisini fyrireika. Hetta kann gerast við at lesa uppskotið og viðmerkingar upp.

Áðrenn tit koma, kunnu tit tosa saman um, hvørt tað standast fíggjarligar avleiðingar og/ella aðrar avleiðingar av uppskotinum hjá tykkum, og møguliga hvussu stórar hesar verða. Um tit hava funnið fram til fíggjarligar avleiðingar og/ella aðrar avleiðingar av uppskotunum hjá tykkum ella okkurt annað, kunnu tit eisini nevna tað í framløguni

Allir ungdómstinglimirnir kunnu seta spurningar ella koma við viðmerkingum til uppskotini, tá tey verða løgd fram. Ætlanin er eisini at býta uppskotini millum næmingarnar, soleiðis at tveir næmingar fáa sum uppgávu at gera viðmerkingar til eitt uppskot í part. Tó ikki til uppskot, sum tykkara egni flokkur hevur gjørt. At fyrireika hetta kunnu tit lesa uppskotini hjá hinum flokkunum. Bræv um hetta verður sent tykkum seinni í vikuni.

Tann 9. februar kl. 13.30 er ætlanin, at løgmaður og landsstýrismenninir eru í Løgtinginum at svara spurningum frá tykkum. Tit verða tí biðin um at orða nakrar spurningar, sum tit kundu hugsað tykkum at sett løgmanni ella landsstýrismonnunum, og senda teir til Løgtingið í seinasta lagi 29. januar kl. 12.00. Tit skulu orða 7 spurningar, og ynskiligt er, at tit ikki seta allar spurningarnar til sama landsstýrismann. Løgtingið tilskilar sær rætt til at velja ímillum innkomnu spurningarnar, um hetta verður neyðugt. Endalig orðing av spurningum verður gjørd undir nevndarviðgerðini 8. februar.

Miðað verður eftir, at hvør ungdómstinglimur sær skal sleppa at royna seg í tingsalinum. Hetta

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

verður gjørt við, at tveir næmingar í flokkinum sleppa at verða uppskotssetari, og hinir 7 næmingarnir úr flokkinum skulu sleppa at seta landsstýrisfólkunum ein munnligan spurning hvør. Umframt hesa uppbýting, fáa tveir til fýra av tykkara 9 næmingum høvi til at gera viðmerkingar til eitt uppskot í part.

Tey, sum tit velja at umboða flokkin á Ungdómstinginum, skulu møta í Løgtinginum, Tinghúsvegur 1-3, 8. februar kl. 9.00.

Hjáløgd er skrá og øll uppskotini, sum koma til viðgerðar á Ungdómstinginum, og sum eru rættaði her. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum í skránni. Ætlanin er at 4 uppskot koma afturat seinni í vikuni, soleiðis at tað verða 10 uppskot íalt. Øll innkomin uppskot koma at liggja á heimsíðuni hjá Løgtinginum á www.logting.fo undir > Ymiskt > Ungdómsting.

Um tit hava okkurt at spyrja um, eru tit vælkomin at ringja til undirritaðu á 363906 ella senda ein teldupost til annar@logting.fo.

Vinaliga

Anna Rein
fulltrúi